


# Seytjan smiðir tóku um endan

*JARNMENN:*

***Klaksvíkar Sleipistøð hevur nógv jørn í eldinum. Gamla Kjølbrovirkið, ið fór av knóranum av kreppuávum í kreppuárum, varð bjargað av fúsum monnum fyri fimm árum síðani. Bjartskygdu starvsfólkini ræðast hvørki framtíð ella Poul Mohr***

HØGNI MOHR

Línuskipið, Pison, liggur bundið við bryggjuna. Stutt áðrenn jól varð farið undir at klassa klaksvíksskipið, og longu nú eru smiðirnir á Sleipistøðini komnir undir land. Arbeiðið verður væntandi liðugt í vikuni.

Júst slík umvælingararbeiði, sum tað umborð á 40 ára gamla Pison, eyðkenna ta gomlu sleipistøðina á Stongunum. Slitni upphálingarvognurin, ið varð keyptur úr Svøríki í 1928 – brúktur - verður ikki nógv nýttur. Væl ber til at toga skipini upp á turt, gerst tað neyðugt, men slíkt er minni parturin av arbeiðinum á sleipistøðini. Smiðirnir eru oftast at finna umborð á flótandi fiskiførum, ið liggja við bryggju á Stongunum. Annars eru teir undir taki á stóra smiðjubygninginum.

**Nógv og ymisk arbeiði**

- Gomlu smiðjubygningarnir fyri sunnan verða bert nýttir til goymslu, sigur nýklakti virkisleiðarin, Kalli Vágklett, og peikar inn móti sjálvari sleipistøðini.

Nýggjara smiðjan er býtt í trý stór høli. Norðasti parturin verður róptur grovsmiðjan. Her verður sveisað og skorið so neistarokið stendur í allar ættir. Tá Sosialurin var og vitjaði, stóð smiðurin, Eyðun Joensen, við einum stórum pumpufóti, ið er av stásiliga nótaskipinum, Christiani úr Grótinum. Neyðugt er at kappa onkustaðni og seta upp í onkustaðni, tí tvær pumpur, ið eru ymsiskar í vavi, skulu passa á hendan sama fót. Slík arbeiði krevja gott hugflog. Eyðun Joensen hevur longu heft broytingarútgávuna av fótinum saman, og stóra pumpan verður síðani lorað niður á hann. Pumpan passar. So er bert eftir at sveisa allar samankomingarnar.

- Einir 20 mans eru í starvi hjá okkum, og hóast talan er um árstíðartreytað arbeiði – við denti á summarið og jólini - so er nóg mikið at tríva í árið á tamb. Tað eru so nógv ymiskt arbeiði, ið verða litin okkum upp í hendi, og hetta er helst við til tryggja rímiliga javnt arbeiði, sigur Kalli.

Aðrastani í grovsmiðjuni eru teir við at leggja seinastu hond á eina snotuliga aluminiumshurð til Pison. Fleiri skip vilja hava sterkar hurðar síðani syrgiligu vanlukkuna við Ågot allahalgannadag, tá ið ein sjógvur knústi seg inn á brúnna.

**Samstarv millum ættarlið**

Opið er millum grovsmiðjuna og dreyiverkstaðin, har arbeitt verður upp á motorar. Hesa vikuna fær Deutzmotorurin á trolbátinum Dúgvubergi eina umfatandi yvirháling.

Í hesum arbeiði hittast fleiri ættarlið av smiðum. Øðrumegin stóra arbeiðsborðið standa teir báðir, royndi reiðarin á Dúgvubergi, Erling Petersen og 41 ára gamli maskinsmiðurin, Hans Jacob Venned. Teir finglast við at loysa fastar boltar úr turbinuhúsanum. Hinumegin borðið stendur sonur Hans Jacob, hin 19 ára gamli Jan Venned. Hann er nýliga farin undir at læra til maskinsmið, men longu nú stendur hann við toppstykkinum á Dúgvubergi og skiftir frostproppar.

Komandi lærlingar á Klaksvíkar Sleipistøð kunnu vænta sær at verða so at siga fullkønir í at umvæla motorar, royna teir at hanga í og lata teir eldru smiðirnar oysa av síni vitan.

Kalli Vágklett sigur, at slíkt viðlíkahald, sum nú fer fram í sambandi við 50 tonsaran hjá Erlingi, og annars útskiftingar av motorum í øðrum bátum, eru stórur partur av grundarlagnum undir Sleipistøðini.

- Og okkara styrki fram um aðrar er, at vit hava eina nøkunlunda støðuga arbeiðsmegi, ið fer til verka eftir loysunarorðunum, fakligur fleksibilitetur. Allir mans skulu kunna gera alt arbeiði á landi og umborð, leggur virkisleiðarin dent á tá vit fara eftir leytaranum og umborð á Pison.

Millum ljósmotorarnar í maskinrúminum á Pison stendur 575 Hk Kallesen motorurin frá 1986. Hann er treystur og álítandi, og slapp undan yvirháling hesaferð. Men el-veitingin umborð kravdi umfatandi ábøtur. Ljósmotorurin í stýriborði er skiftur út, og hin í bakborði verður yvirhálaður. Undir kønu hond Hans Laksagarð hava teir báðir nýklaktu maskinsmiðirnir, Jóhann Olsen og Eyðbjørn Andreassen staðið fyri hesum týðandi arbeiðið. Tá ið navnframa línuskipið aftur verður siglingarklárt, verður farið undir Føroyar at royna.Umfatandi umvælingin umborð á Pison er í milliónaklassanum.

- Tað er vónleyst at geva fult tilboð upp á slíkt arbeiðið, sum hetta við Pison. Stórur partur verður upp á rokning, og tí krevst, at skipaeigararnir hava álit á okkum. Somuleiðis leggja vit stóran dent á nágreiniliga skjalprógving í rokningini, sigur Kalli Vágklett.

Næsta stórarbeiðið á Klaksvíkar Sleipistøð verður gjørt umborð á trolara. Talan er um fyrrverandi rækjutrolara, ið nú eitur Sjúrðarberg og fiskar tosk í Barentshavinum.

- Eg veit ikki um tað passar, men eg havi hoyrt, at Poul (t.e. Tórshavnar Skipasmiðja, *bl.m.*) var ov dýrur, sigur Kalli og smírist. Hann ræðist ikki risar...



*Erling Petersen, reiðari á Dúgvubergi (høgrumegin), hevur litið teimum á Sleipistøðini upp í hendi at yvirhála motorin á fari sínum. Saman við Hans Jacobi Venned, maskinsmiði, roynir hann við borimaskinu, grísapilli og gomlum snildi at loysa fastbrendar boltar úr turbinuni. Boltarnir eru helst fastbrendir, tí teir hava verið smurdir við aluminiumsfeitti. Nýggju boltarnir vera smurdir við koparfeitti, ið tolir hitan á turbinuni, ið kann koma upp á 480 stig.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Longi lá gamla sleipistøðin í Klaksvík still. Men við árslok í 1994 tóku 17 smiðir í Klaksvík um endan. Teir bankaðu á dyrnar hjá danska eigaranum, láni-risanum, Nýkreditt, og keyptu sítt egna arbeiðspláss.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*– Kapping ella ei. Vit samstarva við Poul Mohr og hansara Skipasmiðjur, sigur Kalli Vágklett, ið fyri stuttum fór í starv sum virkisleiðari á Klaksvíkar Sleipistøð.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## FOKUS

| | |
|---|---|
| Navn: | P/f Klaksvíkar Sleipistøð |
| Stovningarár: | 1994 |
| Eigarar: | 17 privatmenn |
| Umsetningur: | Millum 7 & 9 Milliónir |
| Heilárssstørv: | Yvir 20 (av hesum: Tríggir lærlingar) |
| Kundaskari: | 35 – 40 fiskifør í øllum støddum |
| Íløguynski: | Nýggjan bedingsvogn og nýmótansgerð sum heild |
| Leiðslu-sitat: | »Poul kann eiga oljuna« |



*Annar Scania-ljósmotorurin á Pison verður yvirhálaður. Hin er tikin úr, og í hansara stað er komin ein spildurnýggjur Mercedes.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*